# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1230.
# Tíðarskeið: 8/9-28/9 - 2012

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund (8.-24/9), Jákup Reinert (24.-28/9), Lis Larsen (8.-24/9), Poul Vestergaard (14.-28/9), Mourits Mohr Joensen, Rógvi Mouritsen og Jens Arni Thomassen (8.-14/9 og 24.-28/9).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var samanlagdi túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, umframt av øðrum fiskasløgum. Lívfrøðiligar kanningar vórðu eisini gjørdar av havtasku. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum.

**Eyka uppgáva:** Prøvar vórðu tiknir av havtasku. Sjúrður Hammer, sum ger spesiali um skúgv, fekk prøvar av nebbasild, hvítingsbróðri og hýsu.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinshamn lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru av Havnini leygardagin 7. september kl. 12. Túrurin var harvið seinkaður 5 vikur vegna umvæling av Magnusi Heinasyni. Byrjaðu at taka støðir leygardagin á Suðuroyarbankanum, og gjørdu økið eystanfyri liðugt fyrst, síðan tað norðanfyri og fóru síðan suðureftir vestanfyri og suður á Munkagrunnin.. Landaðu í Havn tríggjar ferðir á túrinum (14/9, 24/9 og 29/9). Tilsamans vórðu 217 hál tikin, og av teimum vóru 200 góðkend. Veðrið var skiftandi, ringt og síðan gott, og eingin dagur fór burturímillum fyri veður.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 11. oktober. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. november.

**Fyribilsúrslit:** Munandi meira var at fáa av upsa, meðan minni fekst av toski, hýsu, og nógvum øðrum fiskasløgum (Talva 1). Minni var at fáa av hvítingsbróðri, men meira av svartkjafti. Sum nakað nýtt vórðu stórar nøgdir av smáhýsu (ársins yngul, umleið eina sponn langar). Magakanningarnar vístu, at lítið var til av nebbasild og toskur át onkuntíð slímáll (súgál). Nógv varð etið av smáum hvítingsbróðri. Úti á djúpum ótu toskur og upsi viðhvørt stórar nøgdir av hvítingsbróðri og svartkjafti. Úrslitini í ár eru darvað av, at túrurin var umleið ein mánað seinni enn vanligt hevur verið, og harvið er hann ikki so sambæriligur við onnur ár, sum ynskiligt hevði verið.

Mynd 1 – 3 vísa gongdina í nøgd av ávísum fiskasløgum á føroyska landgrunninum. Í høvðusheitum er tað vorðið minni til av toski, hýsu, upsa og hvítingi, t.e. botnfiski á grunnum vatni, meðan meira er vorðið til av brosmu, longu, og blálongu, t.e. botnfiski á djúpum vatni. Viðvíkjandi pelagisku fiskasløgunum sæst, at ein stór øking var í makreli og sild eftir ár 2006 og at í sama tíðarskeiði øktist mongdin av hvítingsbróðri, meðan hon minkaði av svartkjafti. Tíverri var yvirlitstrolingin í 2012 ikki gjørd fyrr enn í september (4 vikur seinni enn vanligt), og tí er ilt at meta um, hvørt tær minkandi nøgdirnar av makreli stava frá eini veruligari broyting í nøgdini av makreli í 2012 í mun til 2011, ella tað bara er tí, at liðið var meira út á árið.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 1230.

| FISKASLAG | KG í 200 hálum í 2012 | Nytrur | Magar | KG í 200 hálum í 2011 | KG per hál 2012 / 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| UPSI | 25829.23 | 1206 | 279 | 13463.96 | 1.92 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 10279.49 | | | 12865.68 | 0.80 |
| HÝSA | 9552.24 | 1202 | 232 | 12527.66 | 0.76 |
| SVARTKJAFTUR | 8492.59 | 159 | 5 | 4735.65 | 1.79 |
| GULLLAKSUR | 7574.16 | | | 6950.78 | 1.09 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 7072.56 | 20 | 20 | 11258.02 | 0.63 |
| TOSKUR | 6476.98 | 1221 | 275 | 9888.75 | 0.65 |
| LONGA | 3791.77 | | | 4744.67 | 0.80 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 2078.67 | | | 3188.19 | 0.65 |
| MAKRELUR | 971.61 | 149 | | 5758.28 | 0.17 |
| SILVURMURTUR | 856.18 | | | 1014.94 | 0.84 |
| HAVMÚS | 719.35 | | | 786.01 | 0.92 |
| HVÍTINGUR | 667.44 | | | 1084.75 | 0.62 |
| BLÁLONGA | 593.59 | | | 566.65 | 1.05 |
| TUNGA | 522.13 | | | 998.06 | 0.52 |
| SKRAMBUL | 518.80 | | | 595.34 | 0.87 |
| TRANTKONGAFISKUR | 517.94 | | | 703.48 | 0.74 |
| REYÐSPRØKA | 473.10 | | | 615.33 | 0.77 |
| BROSMA | 470.84 | | | 954.54 | 0.49 |
| SVARTKALVI | 439.12 | 10 | 10 | 495.97 | 0.89 |
| ROSSAMAKRELUR | 402.64 | | | 2422.30 | 0.17 |
| KNURRHANI | 396.75 | | | 397.23 | 1.00 |
| HAVTASKA | 236.95 | 33 | | 427.13 | 0.55 |
| KALVI | 205.10 | | 1 | 178.27 | 1.15 |
| TINDASKØTA | 180.00 | | | 141.79 | 1.27 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 160.07 | | | 104.50 | 1.53 |
| LOLIGO | 142.88 | | | 491.97 | 0.29 |
| LÍTLA BROSMA | 135.58 | | | 81.29 | 1.67 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 129.47 | | | 70.34 | 1.84 |
| SANDSPRØKA | 103.85 | | | 211.12 | 0.49 |
| LÝRUR | 101.02 | | | 126.38 | 0.80 |
| LÁLLA | 99.74 | | | 93.01 | 1.07 |
| SKØTA | 78.55 | | | 38.62 | 2.03 |
| HVÍTASKØTA | 67.40 | | | 29.33 | 2.30 |
| HVASSASPREK | 46.96 | | | 55.85 | 0.84 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 41.86 | | | 14.09 | 2.97 |
| BLÁGÓMUR | 35.25 | | | 47.41 | 0.74 |
| LIRI | 31.05 | | | 12.41 | 2.50 |
| GLASKVOYSA | 30.85 | | | 59.05 | 0.52 |
| JÁKUPSSKEL | 26.32 | | | 0.00 | |
| HALAHVASSA SKØTA | 19.63 | | | 15.78 | 1.24 |
| KLINGRUSKØTA | 16.58 | | | 0.16 | 101.73 |
| GLÝSUFISKUR | 12.18 | | | 3.24 | 3.76 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 9.64 | | | 6.66 | 1.45 |
| SILD | 9.63 | 19 | | 226.06 | 0.04 |
| STEINBÍTUR | 7.84 | | | 31.47 | 0.25 |
| ELEDONE | 7.62 | | | 3.61 | 2.11 |
| LYCODES ENDIPLEURISTCTUS | 5.79 | | | 3.40 | 1.70 |
| STREYMSILD | 4.88 | | | 4.05 | 1.20 |
| HVASSHVOYSA | 2.73 | | | 0.00 | |
| ULVFISKUR | 1.77 | | | 8.20 | 0.22 |
| HUMMARI | 1.24 | | | 7.97 | 0.16 |
| RÆKJA | 0.70 | | | 0.64 | 1.10 |
| BLÁRIDDARI | 0.51 | | | 0.00 | |
| HAVNEBBASILD | 0.43 | | | 0.00 | |
| MURRIKRUTT | 0.17 | | | 0.03 | 5.60 |
| KRØKILSKRUTT | 0.16 | | | 0.39 | 0.41 |
| KRYTTLINGUR | 0.15 | | | 0.00 | |
| HORNABROSMA | 0.13 | | | 0.00 | |
| LAKSSILD | 0.01 | | | 0.00 | |
| NEBBASILD | 0.01 | | | 1.86 | 0.00 |
| JEFFREYSA STUBBI | 0.00 | | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 90651.87 | 4019 | 822 | | |

**Viðmerkingar:** Ongar.

Petur Steingrund







Mynd 1. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) av toski, hýsu, upsa, brosmu, longu og blálongu á yvirlitstúrunum á føroyska landgrunninum hjá Magnusi Heinasyni í august 1996-2012. Í 2012 var yvirlitstrolingin gjørd í september.







Mynd 2. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) av tungu, reyðsprøku, hvítingi, gulllaksi, trantkongafiski og stóra kongafiski á yvirlitstúrunum á føroyska landgrunninum hjá Magnusi Heinasyni í august 1996-2012. Í 2012 var yvirlitstrolingin gjørd í september.







Mynd 3. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) av sild, makreli, hvítingsbróðri og svartkjafti á yvirlitstúrunum á føroyska landgrunninum hjá Magnusi Heinasyni í august 1996-2012. Í 2012 var yvirlitstrolingin gjørd í september.